Kristina Háfoss
løgtingsmaður

Nr. 72/2019

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um føroyska Talgilda Samleikan, netbankan og danska NemID, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a).

1. Metir landsstýrismaðurin, at tað er rætt at seta krav um at skula útvega sær danska NemID fyri at kunna nýta netbanka og lønarportal í Føroyum?
2. Hví verður krav um hetta sett fram júst nú?
3. Metir landsstýrismaðurin, at tað verður ein vansi fyri gagnnýstlu og útbreiðslu av føroyska Talgilda Samleikanum, um fólk í Føroyum fyrst skulu skifta til danska NemID, fyri síðan at flyta til ein føroyskan Talgildan Samleika eftir fáum mánaðum?
4. Heldur landsstýrismaðurin, at rættast hevði verið, at føroysku peningastovnarnir varðveittu frælsi hjá føroyingum at velja innritingarloysn, til nýggi føroyski Talgildi Samleikin kann nýtast til netbankan v.m.?
5. Fer landsstýrismaðurin at taka stig til at fáa semju við føroysku peningastovnarnar um at sleppa kravinum um, at fólk í Føroyum skulu nýta danska NemID?

Viðmerkingar

Nýggi, føroyski Talgildi Samleikin er nú nær - og verður hesin eitt stórt framstig fyri Føroyar og føroyingar.
Talgildi Samleikin skal gera gerandisdagin lættari hjá fólki í Føroyum, og fer m.a. at kunna nýtast til at avgreiða eina røð av almennum og privatum tænastum, og fer eisini at kunna nýtast til netbankan um stutta tíð. Harvið sleppa fólk í Føroyum undan at hava fleiri lyklar og samleikar, men kunnu nýta tann eina Talgilda Samleikan til at avgreiða flest allar talgildar tænastur.

Talgildu Føroyar hava fráboðað, at nýggi føroyski Talgildi Samleikin eftir ætlan verður tikin í nýtslu fyri summarfrítíðina í ár. Verkætlanin við Talgilda Samleikanum byrjaði av álvara í 2016, og verður endaliga úrslitið eitt úrslit av stórum arbeiði frá nógvum síðum – har eisini peningastovnarnir hava luttikið.
Men júst nú vit eru so nær at fáa føroyska Talgilda Samleikan tiknan í nýtslu, hevur Felagið Føroyskir Peningastovnar alment fráboðað, at fólk í Føroyum, ið ynskja at hava atgongd til netbanka og lønarportal eftir 29. mai 2020, skulu nýta danska NemID. Hetta merkir, at fólk, ið ynskja at kunna nýta netbankan ella lønarportalin í Føroyum, fyrst skulu flyta yvir á NemID í mai-juni, fyri síðan aftur at taka støðu til, um flytast skal yvir á Talgilda Samleikan seinni í ár. Tá er sannlíkt, at færri velja at flyta einaferð enn. Hetta er ikki til fyrimuns fyri fólk í Føroyum og heldur ikki fyri gagnnýtsluna av føroyska Talgilda Samleikanum.
Landsstýrið og peningastovnarnir áttu heldur at gjørt semju um, at krav ikki verður sett til føroyingar um at flyta yvir á danska NemID, men heldur at nýta tíð og orku til at fáa føroyska Talgilda Samleikan í nýtslu til netbankan og aðrar tænastur í Føroyum sum skjótast. Hetta er og verður til fyrimuns fyri allar partar.
Fyri at fáa lýst málið verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 21. apríl 2020

Kristina Háfoss